e-mail: jakup@sosialurin.fo
Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini
ÍtróttaSosialin á
alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Slagið um Havnina: 1. partur

*Báðir partar hava so at siga alt fólkið tókt, tá teir leygardagin skulu royna seg í fyrru útgávuni av slagnum um Havnina*



*Einki er at ivast í, Andrew av Fløtum verður eitt av evnunum, tá B36 fyrireikar seg til grannauppgerðina*

Jákup Mørk

Ofta verður tikið til millum kappróðrarfólk, at um ein ikki kann gerast føroyameistari, so er tað ein risastór troyst at vinna róðurin á Ólavsøku.

Heilt ólík hesum, er støðan millum høvuðsstaðarfeløgini ikki. Burtursæð frá at gerast føroyameistarar, vilja tey meira enn nakað annað vinna á grannunum.

Ikki minst er hetta galdandi millum áskoðararnar, og tí er lagið vanliga gott á kassameistarunum í feløgunum, tá hesir dystir standa fyri framman.

**Bæði vilja vinna**

Umframt at vera grannauppgerð er talan í ár eisini um oddauppgerð, og við einum sigri kunnu bæði liðini betra munandi um støðu sína.

Greiðastu treytirnar tykjast HB leikararnir at hava. Eitt tap viðførur fyri teirra viðkomandi, at teir í fyrstu atløgu verða afturúrsigldir, soleiðis at B36 tá verður sjey stig frammamn fyri teir. Hinvegin kunnu teir minka munin niður í eitt stig við einum sigri, og einki er at ivast í, at teir tí fara eftir sigrinum.

Tað gera B36 leikararnir helst eisini. Fyri framman hava teir fleiri torførar dystir, og tí vilja teir helst konsolidera støðu sína í oddinnum so væl sum gjørligt.

Hinvegin er javnleikur helst eitt meira toluligt úrslit fyri yngra høvuðsstaðarfelagið, men einki at ivast í, at hvørki leikarar ella áskððarar hgusa tann vegin, at liðið skal út at verja tað eina stigið, sum teir hava, tá dysturin byrjar.

**Nærum fullmannaði**

Bæaði havnarliðini hava verið nógv rakt av skaðum seinastu tíðina, og serliga B36 hevur verið noytt at prógva, at leikarahópurin hevur neyðugu breiddina til at gera seg galdandi í oddinum.

Felags fyri bæði er tó, at nógvir at skaddu og leikbannaðu leikarunum nú eru tøkir aftur, og tí verða tað tvey lið, og nærum sterkastu uppstilling, sum fara á vøllin leyggardagin.

Hjá HB var Jón Rói Jacobsen ikki við móti FS Vágum fyrr í vikuni, men hann er so smátt farin at venja aftur. Hinvegin er ikki líkt til, at rumensku leikararnir hjá HB eru tøkir. Florin Miháescu er framvegis skaddur í lærkrikanum, meðan skaðin, sum Gigi hevur havt í búkvøddunnum, aftur gjørdi um seg mikudagin, tá hann noyddist út eftir lítlari løtu.

B36, sum annars hevur verið rættuliga skert seinnu vikurnar, hevur so at siga alt fólkið tókt til dystin. Undantøkini eru Bjarni Prior, sum fekk sítt triðja gula kort í Runavík fyri viku síðani, og Carl Høgnesen, sum er langtíðarskaddur.

Hinvegin eru Jens Kristian Hansen, Herbert í Lon Jacobsen og Ronnie Samuelsen allir tøkir aftur, og allarhelst verða hesir at síggja millum teir fyrstu 11 á vøllinum.

**HB hevur takið**

At HB hevur takið í grannauppgerðunum er einki at taka seg aftur í. Síðani B36 vann seinasta dystin í kappingarárinum 1990, hevur tað bert eydnast teimum at bast grannunum tvær ferðir, í 1996 og 1998. Fýra ferðir hevur úrslitið verið javnleikur, meðan HB hevur vunnið 12 ferðir.

# Toppdystur á grasvøllinum

*Bæði B68 og VB vilja ógvuliga fegin vinna fyri at varðveiða plássið millum tey fremstu*

Vágbingar koma á Svangaskarð fyri at vinna. Tað sigur spælandi venjarin hjá teimum, Krzysztof Popczynski:

– Tað er hugaligt at vera við í toppstríðnum, og vit vilja fegnir halda tørn um triðja plássið. Um tað fer at eydnast er ikki minst treytað av úrslitunum í dag og annan sunnudag, tá vit fáa vitjan av B36. Vit hava nógv at hugsa um, tí longu mánadagin skulu vit spæla seinnu semifinaluna móti HB. Tibetur skulu vit ikki ferðast til tann dystin. Tað lættir um.

VB venjarin sigur, at Tórður Holm og Jón Gærdbo eru ivasamir. Tórður hevur trupulleikar við knænum, og Jón plágast av bruna í skinnabeininum. Teir hava bara vant eina ferð í vikuni, og tað er ivasamt, um teir verða førir fyri at spæla:

– Í fjør høvdu vit bara ellivu spælarar. Í ár hava vit 16–17 spælarar, sum hava 1. deildarstøði. Teir, sum sita á beinkinum, brenna sjálvandi eftir at vísa sínar dygir, og tí sigur tað seg sjálvt, at ivasomu menninir bara fáa møguleikan, um vit undir upphitingini halda, at teir eru førir fyri at geva seg fult og heilt.



*Marcello og Predrag eru tveir av útlendsku leikarunum, sum eru vanir á spæla á grasvølli*

**Á grasinum**

Á Svangaskarði hava teir vant á grasinum hesa vikuna. Brasiliumonnunum og nógvum øðrum líkar væl tað undirlendið. Men teir á Toftum ivast í, um fyrimunurin verður so stórur hjá heimaliðnum, tí VB hevur fýra útlendingar á liðnum, sum eru vanir at spæla á garsi.

Í B68 rokna teir ikki við, at Fróði Benjaminsen verður við. Hann kom inn, tá teir vunnu móti HB í Gundadali, men nú spøkir skaðin í knænum aftur. Jan C. Dam hevur trupulleikar niðarlaga í rygginum. Hann vandi ikki í síðstu viku, men hann megnaði at spæla móti HB. Hann hevur ikki vant í hesi vikuni, men teir rokna við, at hann fer at spæla móti VB.

Síðani 1988 hava B68 og VB dystast 22 ferðir í landskappingini. B68 hevur vunnið 13 ferðir, VB hevur vunnið sjey ferðir, og bara tvær ferðir hevur verið javnleikur. VB hevur ikki vunnið á Svangaskarði síðani í 1997.

JH

**Støðan, 1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 29 | 9 | 20 | 18 |
| 2 | B68 | 7 | 5 | - | 0 | - | 2 | 17 | 12 | 5 | 15 |
| 3 | HB | 7 | 4 | - | 2 | - | 1 | 12 | 8 | 4 | 14 |
| 4 | VB | 7 | 3 | - | 3 | - | 1 | 16 | 12 | 4 | 12 |
| 5 | KÍ | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 17 | 6 | 11 | 11 |
| 6 | GÍ | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 13 | 15 | -2 | 8 |
| 7 | B71 | 7 | 2 | - | 1 | - | 4 | 8 | 9 | -1 | 7 |
| 8 | Sumba | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 5 | 28 | -23 | 6 |
| 9 | NSÍ | 7 | 1 | - | 2 | - | 4 | 11 | 16 | -5 | 5 |
| 10 | FS Vágar | 7 | 0 | - | 2 | - | 5 | 6 | 19 | -13 | 2 |



# Tað stendur nógv á Runavíkingum

*Sumbingar hava ongantíð áður vunnið meira enn tveir dystir í sama kappingarari*

Jákup Mørk

Eftir at trý tey fyrstu umførini av landskappingini vóru leikt, taldist NSÍ framvegis millum liðini, sum áttu til góðar at tapa ein dyst.

Nógv er tó broytt síðani tá, og í løtuni eru runavíkingar á næstaftasta sessinum. Eitt úrslit av, at teir nú hava tapt fýra ferðir á rað í landskappingini.

**Noyddir at vinna**

Trýgvi Mortensen, sum venur runavíkingar, ásannar eisini, at støðan er alt annað enn hugalig í løtuni.

- Dysturin í morgin er so at siga altavgerðandi fyri okkum, tí úrtøkan av hesum fer at avgera, hvør støðan hjá okkum verður restina av kappingini.

Undan kappingini varð roknað við, at NSÍ fór at teljast millum liðini í miðjuni av stigatalvuni. Hetta kann eisini røkkast enn, men tað krevur sigrar í teimum báðum komandi dystunum. Móti Sumba í dag og móti B71 um eina viku.

Manningin hjá NSÍ verður so at siga óbroytt í mun til dystin móti B36, og hetta merkir, at venjarin framhaldandi ikki roknar við at hava Djóna N. Joensen ella Christian Høgna Jacobsen tøkar.

**Kunnu seta met**

Í Sumba er lagið munandi betri enn í Runavík. Málið hjá teimum hevur alla tíðina verið at bjarga lívinum í bestu deildini, og ein sigur í dag er eitt risastórt fet á røttu leiðini.



*Arnfinn Langgard er nú komijn fyri seg aftur, og hann verður allarhelst á vøllinum, tá NSÍ vitjar í Sumba*

Tær tríggjar undanfarnu ferðirnar, sum Sumba hevur verið í bestu deildini, hava teir ongantíð vunnið meira enn tveir dystir sama kappingarári, men eisini hetta metið stendur at falla, um talan verður um sigur í dag.

Milan Cimburivic, sum venur sumbingarnar, sigur við Sosialin, at hann hevur so at siga allar mans tøkar, og hann letur eisini væl at hugburðinum, sum hansara menn hava sýnt í vikuni.

- Fyri okkum er dysturin sera týdningarmikil, og vinna vit dystin, eri eg vísur í, at vit verða hangandi í deildini, sigur ein sera spentur venjari.

**Javnt í tølum**

Í steypakappingin vunnu liðini bæði hvør sín dyst í bólkaspælinum. Í Runavík vann Sumba 1-0, meðan dysturin í Sumba endaði við 5-0 sigri til runavíkingar. Dysturin í Sumba í fjør endaði við javnleiki 1-1.

# B71 ætlar sær stig móti meistarunum

*Hóast teir fýra tær síðstu ferðirnar hava tapt 2–17 móti KÍ, so halda sandoyingar seg hava møguleika í dag*

Meistaraliðið úr Klaksvík, sum – eftir bara at hava fingið tvey stig í fýra teimum fyrstu dystunum – hevur fingið fult tríggjar tær síðstu ferðirnar, vitjar á Sandi í dag. Klaksvíkingar vita, at skulu teir hugsa um at hava møguleika at endurvinna FM, so skulu teir vinna hvørja ferð.

– Lagið er gott, og hugburðurin er góður. Arnold Joensen er farin at venja aftur í hesi vikuni, og Símun Waag Høgnesen er farin at renna. Eg havi ikki vant í vikuni orsaka av vøddaskaða, og Marek var eisini burturfrá fyrrapartin av vikuni. Men tað er stór kapping um plássini, staðfestir KÍ veteranurin Harley Bertholdsen.

**Hagtølini vánalig**

Tey fyrstu árini, tá B71 kom í fremstu røð, høvdu teir rættuliga gott tak á KÍ. Tey seinnu árini hevur tað staðið verri til. B71 hevur ikki vunnið á KÍ síðani í 1995, tá teir vunnu 3–1 í Klaksvík. Í 1994 vunnu teir báðar dystirnar 2–0.

Fýra teir síðstu heimadystirnir eru taptir við tilsaman 2–17. Men tað merkir ikki, at B71 hevur lagt kongin, áðrenn KÍ kemur suður: – Vit eru betri fyri nú, enn vit hava verið í nógv ár. Eg haldi, at vit hava møguleika at fáa stig móti øllum hinum liðunum. Vit hava fleiri kvalifiseraðar spælarar, enn vit hava havt í fleiri ár, og tað verður nógv lagt fyri undir venjing, sigur Eli Hentze. Hann roknar við, at tað verður tað, sum teir plaga at rópa dagsformurin, ið fer at gera av, hvar stigini skulu fara.



*Sandoyingar ætla ikki at taka til takkar við einum plássi í botninnum hetta kappingarárið*

Eingin B71 maður er skaddur. Hans Jørgin Djurhuus og Jógvan Jón Petersen vóru leikbannaðir seinast, men teir eru tøkir aftur.

Á Sandi siga teir, at dysturin har verður klokkan 14.00.

JH

# GÍ slítur gáttina hjá vágamonnum

*Hjá illa sperdu vágamonnunum eru tveir av lyklaspælarunum ivasamir, tá teir í dag fáa vitjan av svongu gøtumonnunum*



*Gøtumenn skulu hálva vegna búleikast í Sørvági um hvítusunnuna, har teir hitta FS Vágar tvær ferðir*

Tað eru tvey illa sperd lið, sum hittast í Sørvági bæði í dag og 2. páskadag. FS Vágar er um at gleppa heilt burtur ímillum í botninum. Og eftir tapið í Vági síðsta sunnudag, er GÍ dottið aftur av í stríðnum um heiðursmerkir og atgongumerkini til altjóða fótbólt.

Gøtumenn og FS Vágar hava í Vágum spælt javnleik í bólkaspælinum. FS Vágar vann bólkadystin í Gøtu, men í fyrru hálvfinaluni taptu teir 4–3. Í landskappingini vann FS Vágar á heimavølli í 1995 3–2. Í 1996 og í 1997 taptu teir.

– Tað er greitt, at Pauli Jarnskor verður ikki við í dag. Hann fekk eitt trælær undir venjing í vikuni. Møguliga verður hann tøkur 2. hvítusunnudag. Jóan Petur Olsen er so smátt farin at venja aftur. Allir hinir spælararnir eru tøkir, og Poul Ennigarð kemur úr Danmark, sigur GÍ liðformaðurin Magni Jarnskor. Hann harmast um og staðfestir, at tað var ikki nóg gott, at teir ikki fingu stig í Vági, sjálvt um teir skoraðu trý mál.

**Tór–Ingar stóran týdning**

Í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini varð Tór–Ingar Akselsen borin av vøllinum. Nú er hann komin so mikið fyri seg aftur, at hann hevur runnið hesa vikuna. Bæði í 3–0 tapinum á Sandi – tá vóru eisini lyklaspælararnir Albert Ari Thomassen og Birgir Joensen burturfrá – og mikukvøldið móti HB sást, hvussu stóran týdning evnaríki Tór–Ingar hevur á miðvøllinum.

Albert Ari Thomassen spældi mikukvøldið við brotnari hond, og teir í Vágum rokna við, at tað aftur í dag verður ein glastrevjaskinnara, sum skal verja brotnu hondina hjá liðformanninum.

Eftir vánaligu gongdina tykist sjálvsálitið vera ein trupulleiki hjá FSV. Tí verður uppgávan hjá venjaranum at blása spæligleðina í sínar spælarar, sum vágamenn vístu í fyrru hálvfinaluni í steypakappingini.

JH

## Dystir um vikuskiftið

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | FS Vágar - GÍ | Petur Reinert |
| 10.06 | B68-VB | Kim Ejdesgaard |
| 10.06 | B36-HB | Lassin Isasen |
| 10.06 | Sumba-NSÍ | Niklas á Líðarenda |
| 10.06 | B71-KÍ | Jens Petur Brattalíð |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | NSÍ-TB | Suni Johansen |
| 10.06 | HB-TB | Regin Egholm |
| 10.06 | EB/Streymur-B36 | Petur Hansen |
| 10.06 | Royn-ÍF | Hans F. Hansen |
| 10.06 | LÍF-KÍ | Jákup Martin Kjeld |

**3. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 10.06 | FS Vágar-ÍF | Petur Reinert |
| 10.06 | B68-VB | Kristian Joensen |
| 10.06 | B36-AB | Sunleif Álaberg |
| 10.06 | TB-Skála | Zoran Mancic |
| 10.06 | B71-KÍ | Eiler Rasmussen |

**Kvinnudeildin**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | GÍ-VB | Páll Rói Poulsen |
| 12.06 | AB-HB | Laurits í Króki |
| 12.06 | Sumba-Skála | Frits Poulsen |
| 12.06 | B71-NSÍ | Hans F. Hansen |
| 12.06 | B36-KÍ | Ransin N. Djurhuus |

**Løgmanssteypið**

| | | |
|---|---|---|
| 12.06 | FSV-GÍ | Lassin Isaksen |
| 12.06 | VB-HB | Kim Ejdesgaard |